# Eg síggi fleiri fyrimunir í at leggja smáar stovnar saman

JÁKUP MIKKELSEN
formaður í Trivnaðarnevnd Løgtingsins



Millum 10 og 20 sethús í Havn og aðrastaðni í landinum verða í dag brúkt til smáar stovnar, sum allir tæna einum góðum endamáli, men teir kundu verðið riknir enn betri og bíligari í einum størri samanløgdum stovni, sum varð bygdur og innrættaður til endamálið.

Trivnaðarnevnd Løgtingsins var hósdagin í farnu viku á vitjan hjá stovnum undir Nærverkinum, sum liggja í Tórshavn. Talan er um smáar bústovnar fyri fólk við ymiskum sertørvum, har millum 4 og 5 fólk búgva á hvørjum stovni.

Ein ógvuliga áhugaverdur túrur, har Trivnaðarnevndin fekk staðfest, at hesir stovnar verða riknir og umsitnir av sera dugnaligum og eldhugaðum starvsfólkum, sum gera eitt sera gott arbeiði.

Kortini stendur serliga ein spurningur eftir, tá ið ein hevur vitjað so nógvar smáar stovnar: Fær landskassin tann best og bíligast møguliga raksturin við so smáum og spjaddum stovnum og eru umstøðurnar hjá búfólki og starvsfólki nóg góðar?

**Órationelt við smáum stovnum**

Eingin ivi er um, at hvør einstakur av hesum stovnum hava sína egnu søgu, har teir eru settir á stovn vegna ein tørv í samfelagnum, og soleiðis hava vit so við og við fingið ein stovn fyri og annan eftir, sum allir hvør sær tæna einum týðandi og neyðugum endamáli, sum er at vera um tey sum hava serligan tørv í samfelagnum.

Men hetta frítekur tó ikki okkum, sum varða av landskassanum at hugsa um og gera tað, vit kunnu, fyri at gera tænsturnar enn betri, samstundis sum meira verður fingið fyri hvørja skattakrónu – tað er hetta, sum liggur til grund fyri hesum hugsanum mínum.

Við verandi bygnaði hava vit í dag eitt rímiliga høgt tal av atskildum húsum, sum hava við ymisk sløg av búfólkum og brúkarum at gera. Hetta ger, at meðan eitt hús kanska er fult og haraftrat hevur brúk fyri onkrum plássi aftrat, so hevur eitt annað okkurt pláss til avlops, men tú mást taka altlit tey sum eru á stovninum, tí hvør stovnur er ætlaður og skúlaður til at taka ein ávísan sertørv. Ein skeiv samanseting av brúkarum er óheppin.

Hetta er náttúrligt og ringt at umgangast, av tí at húsini liggja so spjadd, sum samstundis eisini ger, at talið av t.d. náttarvaktum er lutfalsliga stórt – tað fær ikki verið øðrvísi við verandi bygnaði.

Samanumtikið er niðurstøðan, at hóast hvør stovnur ger eitt sera gott og týðandi arbeiði, so er hesin rakstrarháttur samanlagt ikki tann bíligast møguligi, tí hann er órationellur og óliðiligur – tú ært ikki samkoyrt nakað sum helst millum so spjaddar bygningar.

Givið er, at ein slík støða ikki verður broytt í skjótari vend, men verður rætt atborið, eigur tað ikki at vera ómøguligt – heldur ikki fíggjarliga – at leggja hesi viðurskifti heilt um.

**Fleiri samanbygdir serstovnar í einum**

Eingin ivi er um, at rætta loysnin er, at landið – í samráð við serkunnleikan á hesum øki – letur byggja ein samanbygdan stovn, har fleiri av verandi serstovnum verða undir sama taki, men tó í neyðugan mun atskildir, so teir ymisku brúkararnir vera fyri seg um tørvur er á tí.

Stovnurin kann hóskandi verða samansettur av 4 til 6 geirum, har pláss er til 8-12 brúkarar í hvørjum.

Ein slíkur samanlagdur stovnur letur upp fyri rakstrarligum vinningi, sum ikki er gjørligur í dag. Fyri tað fyrsta kunnu vaktarskipanirnar á stovnunum samstarva og í ávísan mun samkoyra, og harumframt letur hetta eisini upp fyri at "læna" hølir frá hvørjum øðrum, tá ið ein brúkarabólkur veksur og tí krevur fleiri hølir, sum kanska eru til avlops hjá onkrum øðrum bólki.

Eingin ivi er um, at ein slík bygging gevur mundandi rakstrarligar sparingar, uttan at hetta gevur eina verri tænastu – kanska tvørturímóti, tí starvsfólkini fáa jú fleiri møguleikar at samstarva og stuðla hvørjum øðrum tvørtur um brúkaramørk.

Verandi stovnar liggja, sum nevnt, allir í bygdum umhvørvi, sum eisini er hóskandi og gevur bestu møguleikar, tá ið farið verður út, tí slíkir stovnar eiga at hava møguleikan at integrerast í eitt býarlív. Ein slíkur stovnur eigur tí eisini at verða staðsettur í bygdum umhvørvi, uttan tó at siga, júst hvar ein slíkur stovnur skal liggja.

Tað eru ivaleyst stovnar, har umstøðurnar tala fyri, at ein ikki skal leggja hesar saman við øðrum, og smáir stovnar fara uttan iva framhaldandi at hava sítt pláss í okkara samfelag, men samstundis eigur hetta ikki at forða okkum í at kanna hendan møguleikan fyri samskipan av fleiri smáum stovnum, sum í dag verða riknir sjálvstøðugt, tí teir eru spjaddir kring um í Havnini og runt um í landinum.

Tað umgongst ikki, at ein bygging kostar eina ella aðra upphædd í sjálvari íløguni, men samstundis er vert at hava í huga, at byggingin í hesum føri lutvíst kann verða fíggjað við sølu av teimum bygningum, har stovnarnir í dag halda til. Her er í fleiri førum talan um sethús í Havn, sum hava rímiliga høgt søluvirði.

# Sjófólk fyri skotum

JÁKUP MIKKELSEN
løgtingsmaður



Um Javnaðarflokkurin heldur, at sjómenn skulu hava minni, og alment lønt hava meir, so er tað ein ódámlig javning, har lagt verður eftir einum lítlum bólki av fólki, nevniliga teimum uml. 800 sjófólkinunum.

Javnaðarflokkurin hevur skotið upp lønarsteðg í tvey ár. Hetta váttar Eyðgunn Samuelsen í grein og Fólkaflokkurin tekur undir við hesum, men mælir samstundis til, saman við røð av øðrum tiltøkum yvir næstu fimm árini, at fáa hallið á fíggjarlógini burtur.

Lønarsteðgur á almenna arbeiðsmarknaðinum er ikki at taka nakað frá nøkrum, men bert at geva somu løn, tvs øll á almenna arbeiðsmarknaðinum fáa tað sama í løn næsta ár sum í ár.

At avtaka sjómansskattin, er at hækka skattin hjá sjómonnum, tvs at sjómenn fáa minni.

Um javnaðarflokkurin heldur at sjómenn skulu hava minni og alment sett hava meir, so er tað ein ódámlig javning, har lagt verður eftir einum lítlum bólki av fólki, nevniliga teimum uml. 800 sjófólkunum.

Sjófólkið hevur ikki havt lønarsteðg seinnu árini, men lønin er minka munandi í fiskivinnuni. Hjá summum fiskimonnum er lønarinntøkan minka við 50%. Hetta mátti Eyðgunn Samuelsen, sum býr í Klaksvík vita. Og so royna at taka meir frá teimum - álvaratos hvat hugsar javnaðarflokkurin fyri sær?

Tá byrðar skulu berast, er best at fleiri bera, ikki bert ein bólkur. Um skatturin hjá sjófólki verður óbroyttur og lønin hjá alment settum óbroytt, verða báðir bólkar viðgjørdir líka.

Er tað satt sum summi siga, at Javnaðarflokkurin altíð er har sum pengarnir hjá hinum eru?

At summi hava sera ilt av skattafrádráttin hjá sjómonnum er torført at skilja. Allir føroyingar, sum arbeiða í útlandinum hava ein frádrátt í skattinum, tað verið seg hondverkarar, sjófólk undir NIS og DIS o.s.fr.

Um fólk í almennum starvi fer arbeiðsørindi av landinum, fær persónurin uml. 400,- kr skattafrítt fyri hvønn dag í útlandinum.

Um fólk hava langt at koyra til arbeiðis letur landskassin ein koyristuðul og er tað neyðugt at búgva á arbeiðsstaðnum, fæst stuðul fyri dupult húsarhald.

Sjófólk, sum arbeiða á sjónum fáa eisini ein frádrátt. Yvirhøvur er talan um, at vit øll fáa frádrátt ella stuðul um vit arbeiða langt frá okkara heimi

Øll okkara grannalond geva eisini sjómannafrádrátt. Í Danmark fáa sjófólk ein skattafrádrátt uppá 56.900 kr. Í Norra er sjómanafrádrátturin 30%, men í mesta lagi 150.000 norskar. Í Føroyum er sjómannafrádrátturin 14%, men í mesta lagi 67.000.

Vanliga vilja vit samanbera okkum við grannalondini og tá tað kemur til sjómannafrádrátt, so er tað ikki nakað serføroyskt.

# Vel meg og meg og meg

STEINTÓR RASMUSSEN



Tvey ár við einum valdømi var nokk. Føroyingar tola ikki ov stórt frælsi, og fólkaræðið skal aftur avmarkast til, at vit mugu velja grannan, pápabeiggjan ella onkran lokalan á staðnum.

Ikki var gamalt at bakka fram. Men spurningurin, hvussu Føroya Løgting skal mannast, og hvussu vit løggeva og stýra her á landi, er allatíðina aktuellur. Tó undrar tað meg, at vit framvegis mala í tí sama. At ongin hevur torað at hugsa tankan, at latið fólkið í Føroyum fingið meira enn bert ta einu atkvøðuna!

Í nógv ár hava vit, tá talan er um onkrar hissini felagsskapir, sett nógv nøvn upp á listar og krossað av fyri fleiri av fólkunum Tað kann tykjast løgið og bakvent, at vit sleppa at atkvøða upp á tríggjar ella kanska fimm persónar, tá tað lokala fótbóltsfelagið hevur aðalfund, men tá Føroya Løgting skal veljast, og oman fyri hundrað skilafólk í mánaðir skriva, røða og argumentera fyri, hvussu samfelagið skal skipast, so skal bert ein krossur setast.

Tey flestu vita, hvussu trupult tað er at velja fólk og flokkar inn á ting. Summi velja við hjartanum, og onnur meta um møguleikarnar hjá honum ella henni at fáa atkvøður og gera seg galdandi í politikki. Nógv kenna seg noydd at velja familju og vinfólk, og nøkur royna at forbarma seg yvir ein starvsfelaga, sum av eini ella aðrari orsøk er endaður á einum lista.

Spurningar og spekulatiónir flúgva í luftini. Fer fólkið at savnast um tann nýggja og lovandi kandidatin í bygdini, ella er tað rættasta at lata floksformannin í Havn fáa atkvøðuna? Skulu kvinnur velja tað sama sum maðurin, ella skulu tær standa saman um at fáa sítt egna kyn betri umboðað á tingi? Skulu ung velja ung? Fiskimenn fiskimenn? Havnarfólk havnarfólk? Fólk í samkomum fólk í samkomum? Skulu vit velja sum bygdin, húsið og familjan altíð hevur gjørt?

Jú, eg havi roynt tað sjálvur. Nærum hvørjaferð tað hevur verið val. Tað hava altíð verið fleiri, sum eg kundi ynskt mær at valt, men tað er rættuliga avmarkað, hvat ein kann gera við bert tí einu atkvøðuni. Gamaní, so ber til at atkvøða ymiskt í sama húsi, men tá gerst uppaftur meiri smábýtt við atkvøðunum...

Eg havi heldur hug at halda, at ein skipan, har hvør veljari fekk meira enn ta einu atkvøðuna, hevði viðført eina meiri uppiborna umboðan og kvalifiseraða samanseting av fólkavaldum í Føroyum. Ivaleyst hevði tað havt eina jaliga ávirkan á politiska kjakið og arbeiðslagið millum valini. Tingfólk høvdu ikki í sama mun átt og arbeitt fyri sínar egnu veljarar, tí hvør einstakur borgari í samfelagnum slapp at seta fleiri krossar á valdegnum.

Í dag er stórur partur av stemmunum mestsum oyramerktar, og nógvastaðni kring landið eru forholdini smá og ágangurin eftir atkvøðuni stórur. Kvinnur mugu stríðast fyri at rætta upp á tað vanbýti teimum er fyri á tingi. Fólk í útjaðaranum stúra fyri síni umboðan í framtíðini. Atkvøður verða tíðum keyptar fyri tænastur og gylt lyfti. Spurningurin er, um politisku hugsjónirnar og ábyrgdin at virka fyri øllum samfelagnum, ikki høvdu vaksið í takt við, at atkvøðutalið hevði verið trífaldað til einar 100.000 atkvøður? Og hevði fólkaræðið mist nakað, um borgararnir í landinum sluppu at velja trý úr sama flokki, ella kanska uppaftur meira spennandi: Helenu Dam á Neystabø, Jastrid Gullaksen og Sjúrð Skaale, hóast hesi umboðaðu ymiskar flokkar.

Tað kann vera, at fólk í øðrum londum ikki seta fleiri krossar, tá hesi velja sínar politikarar. Men í heiminum rundanum okkum kunnu fólk í størri mun velja eftir egnu bestu sannføring og hugsjónum, enn at skula taka fyrilit til familjubond, lokalitet og samkomur.

Fólkaræðið er dýrabært, og tað er umráðandi, at vit skipa soleiðis fyri, at kvinnur og menn á bygd og í bý fáa ávirkan á øll samfelagsviðurskifti. Ikki minst í einum landi, har politikarar tosa við fleiri tungum, er tað næstan neyðugt við fleiri atkvøðum um roknistykkið skal ganga upp.